

# Sjúkrahússtjóri

## Landssjúkrahúsið

**Starvið sum sjúkrahússtjóri á Landssjúkrahúsinum verður við hesum lýst leyst til setan 1. januar 2011 ella eftir nærri avtalu**

Sjúkrahússtjórin er ovasti leiðari á Landssjúkrahúsinum og hevur mótvegis Heilsumálaráðnum endaligu ábyrgdina av virkseminum á stovninum. Afturat sær hevur sjúkrahússtjórin tveir heilsufakligar varastjórar.

Heilsumálaráðið søkir ein stjóra, sum er dugnaligur at taka avgerðir og tolir trýst, samstundis sum yvirlitið verður varðveitt. Tað hevur stóran týdning, at tann, ið settur verður, hevur hug og evni at verða andlitið úteftir, umframt hegni at savna leiðarar og starvsfólk um setningin hjá sjúkrahúsverkinum. Stjórin skal vera álítandi og kunna samstarva væl í einum leiðslutoymi, ganga á odda innan leiðslu og skipað góðar umstøður fyri fakligari menning og gransking.

Dentur verður lagdur á eginleikan at evna handfaringina av sera fjøltáttaðum virkisøkjum, har mótsetningar tíðum eru millum vaksandi krøv og avmarkað tilfeingi. Sjúkrahússtjórin skal vera førur fyri at taka neyðugar avgerðir, sum laga organisatiónina til framtíðina. Væntað verður, at sjúkrahússtjórin hevur royndir við at handfara truplar støður.

Tað hevur týdning, at stjórin er stigtakari, stuðlar og átekur sær ein virknan leiklut í fíggjar- og málstýring á Landssjúkrahúsinum.

Sjúkrahúsleiðslan skal kunna raðfesta, ráðleggja og tryggja munagóðan rakstur og tilfeingisnýtslu innanfyri galdandi fíggjarkarm, soleiðis at borgarin fær ta best møguligu tænastuna.

**Fokusøkini fyri starvið eru:**

- Sjúkrahússtjórin skal saman við leiðslu og starvsfólkum tryggja, at sjúkrahúsið røkkur ásettum málum.
- Sjúkrahússtjórin skal grundfesta menning og tryggja høga dygd í øllum veitingum hjá Landssjúkrahúsinum.
- Sjúkrahússtjórin skal leggja virksemið á sjúkrahúsinum tilrættis út frá politiskt ásettum karmum og forteytunum fyri hesum.
- Sjúkrahússtjórin skal saman við leiðsluni áseta hvørjar tænastur sjúkrahúsið kann bjóða innan fyri teir ásettu karmarnar. Haldgóðar grundgevingar og skjalfestingar skulu verða fyri hesum.
- Sjúkrahússtjórin skal skipa fyri, at viðkomandi hagtøl yvir virksemi vera dagførd og brúkt.
- Sjúkrahússtjórin hevur ábyrgdina av at gera uppskot til fíggjarætlan.
- Sjúkrahússtjórin hevur ábyrgdina av, at játtanin verður hildin.
- Sjúkrahússtjórin skal menna samstarvið við onnur sjúkrahús, primeru heilsutænastuna, útbúgvingarstovnar og aðrar almennar stovnar.

**Rætti umsøkjarin hevur:**

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni.
- Vitan og hollar royndir við fíggjarstýring.
- Leiðsluútbúgivng - diplomútbúgving, masterútbúgving ella líknandi.
- Drúgvar leiðsluroyndir á strategiskum støði í størri organisatión.

**Lønar- og setanartreytir:**

Setanarøkið er Heilsumálaráðið og stovnar undir tí við tænastu á Landssjúkrahúsinum. Viðkomandi, ið settur verður, skal kunna tola broytingar í starvinum, bæði í starvsinnihaldi og vavi.

Næsti fyrisetti er aðalstjórin í Heilsumálaráðnum. Starvið er áramálsett í 5 ár við serligum sáttmála.

Lønin er ájavnt við 38. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins við 15% í eftirlønargjaldi og eini áramálsviðbót.

**Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til:**

Poul Geert Hansen, aðalstjóra, teldupostadr. poul.geert.hansen@hmr.fo tlf. 304050 ella Hera Joensen, ráðgeva, teldupostadr. heri.joensen@amr.fo tlf. 304050

**Umsókn við CV skal sendast til:**

Heilsumálaráðið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: tann 16. november kl. 12:00**

Setanarsamrøður verða væntandi tann 26. nov. 2010, har frumrit av prógvum skulu havast við.
Starvsskipan og Mál- og avrikssáttmáli kann fáast við at venda sær til Bente Wennerberg, menningarstjóra á Landssjúkrahúsinum, bw@ls.fo

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahúsið í Føroyum. Landssjúkrahúsið hevur uml. 180 sengur, innan økini psykiatri, medisin, pædiatri og skurð við gynækologi og obstetrik. Harumframt hevur sjúkrahúsið eygnadeild, røntgendeild við CT og MR skannara – og stóra kliniska/kemiska deild. Læknaligar sergreinir innan t.d. onkologi, pædiatri, kardiologi og barna skurðviðgerð er samskipað sum samstarv við útlendsk sjúkrahús. Ríkissjúkrahúsið er størsti samstarvsfelagi, og harútyvir eru fastar avtalur og konsulentavtalur við universitetssjúkrahúsið í Lund, Landspitalið í Íslandi, eins og onnur sjúkrahús í Danmark.

Eirargarður 2
tel 304050
www.hmr.fo

Heilsumálaráðið
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

Sosialurin 341800

